# Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 28-11-2018 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | FP/AK/TH |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**næmingagjald til skúlatilboð til ung við breki**

Við heimild í § 7, stk. 3 í løgtingslóg um skúlatilboð til ung við breki, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 22. mai 2015, verður ásett:

**§ 1**. Sbrt. Løgtingslóg um skúlatilboð til ung við breki, er skúlatilboðið eitt heildartilboð, sum er sett saman av bústaði, skúla og arbeiði.

**§ 2**. Næmingarnir rinda fyri at búgva í skúlanum.

**§ 3**. Útreiðslur, sum næmingar sjálvir skulu gjalda fyri, eru:
1) Viðgerðir og persónliga røkt, sum ikki hevur við skúlatilboðið at gera,
2) telefon og telduútreiðslur til privata nýtslu,
3) ferðing til egna nýtslu,
4) ferðaseðlar og atgongumerkir til tiltøk, sum ikki hava við skúlatilboðið at gera,
5) bøkur, bløð o.a. til egið undirhald,
6) gjald til frítíðartilboð og
7) lummapening annars.

**§ 4**. Útreiðslur, sum næmingar ikki gjalda fyri, eru:
1) Útreiðslur av og lønir til starvsfólk, ið veita undirvísing ella annað námsfrøðiligt arbeiði, t.e. lønir v.m., námsfrøðilig ráðgeving og vegleiðing til skúlatilboðið annars,
2) tryggingar av starvsfólkum og innbúgvi,
3) skúla- og skrivstovuhald og innbúgv, starvsfólkatelefon, haldaragjøld,
4) undirvísingartilfar,
5) førleikamenning av starvsfólkum og
6) ferðaútreiðslur og atgongumerki til starvsfólk í arbeiðsørindum.

**§ 5**. Áseting av næmingagjaldi er kr. 3.500 um mánaðin í 10 mánaðir og verður bókað inn á Gjaldstovuna á kontu hjá skúlanum.

**§ 6**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Mentamálaráðið, tann xx. desember 2018

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinu